MYNDIR: DITTE M. JOENSEN



# Vápnalógin má herðast

**LØGREGLAN** Í HAVN VIL FEGIN HAVA FØROYSKU **VÁPNALÓGIN** HERDA. **VERANDI** VÁPNALÓG ER FRÁ **1969**, OG ER TÍ **ALS IKKI** TÍÐARHÓSKANDI. NÚ **10** ÁR ERU LIÐIN, **SÍÐAN UPPSKOT** VARÐ GJØRT TIL **NÝGGJA** VÁPNALÓG, ER **LÍKT** TIL AT LÓGIN **LOKSIN** KEMUR FYRI **TINGIÐ**

Á løgreglustøðini í Havn sita fólk og arbeiða við málum um vápn. Hóast hvørki bandakríggj ella borgarakríggj er partur av gerandisdegnum í Føroyum, er tørvur á eini nútímans vápnalóggávu.

- Verandi vápnalóggávan er frá 1969, so tað sigur seg sjálvt, at nógv er broytt síðan hendan kom. Einasta kravið fyri at keypa eina luftbyrsu í Føroyum, er at ein skal vera 18 ár. Og í dag eru luftbyrsurnar so kraftmiklar, at tær eru at sammeta við eina rifflu, og tískil er tað ikki trygt, sigur Tønnis Wardum, løgreglumaður í Havn.

Tað er ikki tí, at føroyingar ikki hava stóra virðing fyri vápnum, og tí duga at handfara vápn á ein tryggan máta, men tað sum Tønnis Wardum saknar, er at ein keypari av eini byrsu fær vegleiðing í at handfara eitt vápn.

- Eg hugsi fyrst og fremst um at fáa eina vápnaskrá, har hvørt vápn verður skrásett hjá løgregluni. Harafturat skuldi tað verið eitt krav, at menn fingu eitt skeið í hvussu ein verjir onnur og seg sjálvar, tá teir eru úti við byrsu. At opna byrsuna og taka patrónirnar úr, tá man tekur ein steðg frá veiðini, so tað er sjónligt, at eingin vandi er við byrsuni. Á sama máta, tá tað er ringt føri, myrkt ella hált.

## Fáir skaðar

Tað eru fáir tilburðir í Føroyum, har fólk eru komin til skaða av vápnum, men í førum har skaðin er hendur, er ofta talan um støður, ein kundi verið sloppin undan, um røttu manngongdir vóru fylgdar.

- Vit hava eingi hagtøl yvir, hvussu nógv vápn eru í landinum, men eg veit so mikið, at hvørja ferð føroyskir innkeyparar av vápnum skulu hava vápn úr útlandinum, enda pappírini á mínum borði til undirskrivingar. Og tað er talan um eina stóra mongd av vápnum hvørt ár. Onkur húsarhald hava upp til fleiri vápn liggjandi.

Føroyingar hava sostatt eina sunna virðing fyri vápnum, ið síðan 1969 eru ment sera nógv og eru vorðin munandi kraftmiklari. Og hóast fólk kenna seg trygg, kann tað vera so skjótt, at ein vanlukka er hend.

-Tí skal vápnalóggávan herðast ongantíð ov skjótt, sigur Tønnis Wardum av løgreglustøðini í Havn.

## Nýtt uppskot

Síðan fyrsta uppskotið varð latið landsstýrisfólkinum í lógarmálum, eru 10 ár liðin og enn er einki hent á økinum. Men frá Innlendismálaráðnum verður sagt, at landsstýriskvinnan hevur sett málið ovarlaga á raðfestingarlistan og at gongd er í málinum.

- Tað gamla uppskotið er sent til hoyringar, og vit vænta at kalla inn til fund um rættingar til uppskotið eftir jól. Tá fundur hevur verið, verður endaliga lógaruppskotið gjørt, og síðan verður uppskotið lagt fyri á landsstýrisfund, væntandi í vár. Um uppskotið verður góðkent á landsstýrisfundi, verður tað lagt fyri tingið, sigur Guðrun Nolsøe, fulltrúi í lógardeildini í Innlendismálaráðnum.

Eilen Anthoniussen
post@sosialurin.fo

